# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Tað er í øllum førum púrasta víst, at hetta er ein maður, sum heilt náttúrligt hevur eina velduga respekt í spælarahópinum*
*Todi Jónsson*



*Valið hjá fólkinum gjørdist eisini valið hjá FSF. Enn er formliga setanin ikki staðfest, men tað eru greið tekin í sól og mána um, um at Colin Calderwood verður næsti føroyski landsliðsvenjarin í fótbólti*

*Mynd: Polfoto/AP*

# Fólkið fekk sín vilja

**Fyri fyrstu ferð verður tað ikki ein norðurlendingur, sum skal standa á odda fyri føroyska landsliðnum, tá altjóða avbjóðingar standa á skránni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var eingin ivi, tá lesarar hjá Sosialinum og Portalinum greiddu atkvøðu um, hvør komandi føroyski landsliðsvenjarin í fótbólti skuldi vera.

Síðani vit mikudagin kundu avdúka, hvørji tey trý seinastu nøvnini á listanum hjá FSF vóru, hevur atkvøðugreiðsla verið á heimasíðuni hjá Sosialinum, og hendan tosaði sítt týðiliga mál. Hóast slíkar quick-poll-kanningar skulu takast við ávísum fyrivarni, so var úrslitið í hesum førinum somikið greitt, at har var eingin ivi um, hvønn venjara fólkið vildi hava.

Seks av tíggju føroyingum høvdu nevnliga peikað á Colin Calderwood, og eftir øllum at døma tók tað ikki so langa tíð hjá FSF-nevndini at koma ásamt um somu niðurstøðu. Fundurin í FSF-húsinum byrjaði nakað eftir klokkan 17, og hálvan triðja tíma seinni kom hvítur roykur úr húsunum við Tórsvøll.

## Populert val

Tað eru sjálvandi fyrst og fremst fakligu atlitini, sum viga tungt, tá ein avgerð av hesum slag skal takast. Men fakliga eru teir tríggir, Serritslev, Kostic og Calderwood, serstakliga væl fyri.

Stóri spurningurin hjá FSF var í so máta, um haldast skuldi fram við danska skúlanum, sum tikið hevur verið til, ella um FSF við at taka eina øðrvísi loysn inn skuldi virka til at flyta nøkur mørk innan føroyskan fótbólt.

Tað vóru greiðar ábendingar um, at hetta seinasta saman við trýstinum, sum atkvøðugreiðslan uttan iva gav, endaði við at peika á Colin Calderwood. Tí hóast starvsnevndin í FSF millum annað er vald til at taka sínar egnu avgerðir, so er eingin ivi um, at tað eisini vigar tungt, at talan gjørdist um eitt val, sum hevur undirtøku millum føroyska fótbóltsáskoðaran. Bæði ítróttar- og fíggjarliga.

Og hóast valið í skrivandi løtu ikki er staðfest av FSF-skrivstovuni, so er eingin ivi um, at tíðindini, sum Kringvarpið bar á heimasíðuni í gjárkvøldið, eru eftirfarandi.

Eftir er hjá FSF at samrøða seinastu snøklarnar í setanini upp á pláss, men tá vit í gjárkvøldið tosaðu við Høgna í Stórustovu, forseta, hevði hann góðar vónir um, at seinastu lutirnir kundu avgreiðast skjótt.

- Enn er tó ikki komið heilt á mál. Vit hava longu fingið vissu fyri, at allir tríggir kandidatarnir passa inn í tann kassan, sum vit høvdu teknað, men talan er jú um persónar, og tí vilja altíð vera smálutir, sum skulu justerast, áðrenn nakað er komið endaliga upp á pláss. Tað er so nakað, sum vit ætla at arbeiða skjótt við, tí tingini kunnu henda skjótt í fótbólti, og tí kunnu aðrir áhugaverdir møguleikar stinga seg upp, sigur FSF-forsetin.

# Eitt spennandi val

**Todi Jónsson heldur tað ljóða spennandi, nú komandi landsliðsvenjarin er ein skotskur fótbóltsprofilur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast privatu áhugamálini í dag liggja í FC Amager, so er eingin ivi um, at kanska fremsti spælari okkara nakrantíð, Todi Jónsson, framvegis hevur stóran áhuga fyri tí, sum fyriferst kring landsliðið. Og hann heldur tað ljóða spennandi, um komandi landsliðsvenjarin eitur Colin Calderwood.

- Fyrst og fremst er hetta eitt øðrvísi val til landsliðsvenjara, og bara tað í sjálvum sær kann skapa nakað av íblástri. Eg veit ikki heilt, um talan so øgiliga nógv er um eitt skifti í stíli, men kanska meira um ein øðrvísi hugsunarhátt, og tað kann jú altíð vera sunt – eisini fyri eitt landslið.

- Sum venjara kenni eg einki til dygdirnar hjá honum, so eg fái illa sagt nakað um tann partin her og nú. Men bara tað, at hann er tann maðurin, sum hann er, kann eisini fáa stóra ávirkan á landsliðið.

- Eg skal ikki siga, at spælarar ikki fara inn fyri at vinna dystir, tí tað vilt tú altíð. Líka mikið um mótstøðan eitur Frakland ella nakað annað. Men tað, at talan er um ein venjara, sum hevur roynt tað, sum hesin hevur roynt, kann onkursvegna geva spælarunum eyka trúgv upp á egin evni. Heimurin er nú eina ferð skrúvaður soleiðis saman, at tú ávirkast av slíkum lutum.

- Og tað er í øllum førum púrasta víst, at hetta er ein maður, sum heilt náttúrligt hevur eina velduga respekt í spælarahópinum, og tað er eisini nakað, sum hevur nógv at siga, sigur Todi Jónsson.